Fylgiskjal 10.

LM-088/2023

**Gunnvá Ellendersen**

**Fra:** Rannvá Bjarkadóttir Mohr
**Sendt:** 5. februar 2024 12:23
**Til:** Løgmálaráðið
**Cc:** Elsa Magnussen
**Emne:** 24/00854-1 - Uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin) komin HMR til hoyringar. Hoyringsfreist 5. feb. 2024, kl 12.

Góðan dag

**Viðvíkjandi Uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)**

Heilsumálaráðið hevur móttikið til uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin) til hoyringar.

Heilsumálaráðið hevur lisið uppskotið og mett um, hvørt uppskotið hevur avleiðingar fyri heilsuøki.

Heilsumálaráðið metir ikki, at uppskotið hevur serligar avleiðingar fyri heilsuøki.

Út yvir tað hevur Heilsumálaráðið tvær tøkniligar viðmerkingar.

- Á síðu 9 verður víst til § 189, stk. 1 í sundheitslógini, Heilsumálaráðið mælir til, at rætta heiti á lógini verður nýtt "anordning nr. 821 af 22. Juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, sum broytt við anordning nr. 1443 frá 29. juni 2021"
- Grein 9 í uppskotinum ásetir at tá talan er um kvinnu undir 18 ár skal foreldramyndugleikin geva samtyki til at søkja um fosturtøku. Grein 17, stk. 1 í føroysku sundhedslógini, ásetir at ein 15 til og við 17 ára gamal – sum útgangspunkt – sjálvur kann geva samtykki til viðgerð, men at foreldramyndugleikin skal – sum útgangspunkt – kunnast og inndragast í støðutakanina hjá tí unga. Í hesum føri er talan um eitt uppskot til serlóg á økinum og metir Heilsumálaráðið tískil, at ásetingarnar í Fosturtøkulógini koma at vera galdandi framum ásetingarnar í føroysku Sundhedslógini. Ein møguleiki er eisini, at skriva hetta inn í serligu viðmerkingarnar til grein 9.

Vinaliga/Sincerely

Rannvá B. Mohr
Fulltrúi

Heilsumálaráðið/
Ministry of Health
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734013
rannva.mohr@hmr.fo • www.hmr.fo

**Fra:** Gunnvá Ellendersen <Gunnvae@lmr.fo>
**Sendt:** 8. januar 2024 16:12
**Til:** Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Familjufyrisitingin <famf@famf.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>;

LM-088/2023

ella@ls.fo; ls@ls.fo; politi@politi.fo; mbo001@politi.fo; srfelag@gmail.com; amnesty@amnesty.fo; megd@megd.fo; mail@psykolog.fo; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Javnstøðunevndin <javnstoda@javnstoda.fo>; Etiskaradid <er@er.fo>; marjusdam@gmail.com; Jan Rasmussen <JanRa@ls.fo>; ljm.foroya@gmail.com; Gigni <gigni@gigni.fo>; mammuhjalpin@mammuhjalpin.fo; provita@provita.fo; frittvalfo@gmail.com
**Cc:** Nella Festirstein <nellaf@lmr.fo>; Elsa Magnussen <Elsam@lmr.fo>
**Emne:** Uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin) til hoyringar

Til hoyringspartarnar,

Góðan dag og gott nýggjár,

Lógaruppskot til nýggja fosturtøkulóg verður hervið sent tykkum til hoyringar.

**Hoyringsfreistin er mánadagin 5. februar 2024, kl. 12:00.**

Møguligar viðmerkingar kunnu sendast Løgmálaráðnum um teldupost lmr@lmr.fo ella til Elsu Magnussen, fulltrúa, á teldupost elsam@lmr.fo .

Um tit hava nakað at spyrja um, eru tit vælkomin at skriva til Elsu Magnussen, fulltrúa, um teldupost ella ringja á telefon 734058.

Til kunningar:

## Nýggj føroysk fosturtøkulóg

Uppskot til nýggja fosturtøkulóg er í dag sent til ummælis. Seinastu tíðina hevur verið arbeitt við at orða eina føroyska lóg um fosturtøku, og Løgmálaráðið hevur havt eina røð av fundum við áhugabólkar, felagsskapir og onnur, ið hava týðandi vitan ella áhuga í arbeiðinum.

### Fosturtøka uttan loyvi

Útgangsstøðið fyri lógini er, at í allar flestu førum kennir kvinnan sjálv sína støðu best og er sostatt best før fyri at taka avgerð um, hvørt hon skal hava fosturtøku ella ikki.
Sum nakað nýtt kann ein kvinna, sum er við barn, fáa fosturtøku, um inntrivið kann gerast áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini.
Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum, sigur, at fleiri fyrimunir eru við ætlaðu lógini, tí við at staðfesta, at kvinnan sjálv kann taka avgerð um fosturtøku innan eina ávísa freist, verða allar kvinnur eins fyri lógini, og hetta er eisini við til at forða fyri, at kvinnur koma illa av ólógligum og ótryggum fosturtøkum uttan vegleiðing frá lækna.

### Ráðgeving

Ein kvinna, sum umhugsar fosturtøku, skal ikki verða einsamøll í støðuni.
Eitt lætt atkomiligt og alment tilboð verður til kvinnur, sum umhugsa fosturtøku, har tær kunnu fáa góða ráðgeving og vegleiðing frá fakfólki, soleiðis at tær kunnu taka eina væl grundaða avgerð um teirra støðu á væl upplýstum grundarlagi.
Tað verður tó ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan frammanundan hevur fingið ráðgeving.

### Fosturtøka eftir 12. viku

Tað kunnu verða støður, ið gera tað neyðugt við fosturtøku eftir 12. viku.
Fosturtøka kann í slíkum førum bara verða framd undir nærri ásettum treytum og við loyvi frá einum samráðið, sum landsstýrisfólkið setir.

Við at seta eitt samráð verður tað eitt og sama ráð, sum kemur at meta um, hvørt treytirnar fyri at fáa fosturtøku eru loknar og um loyvi kann gevast til fosturtøku ella ikki. Harvið verður siðvenja á økinum eins, og hetta fer at tryggja, at

allar kvinnur eru eins fyri lógini. Eisini verða ?pinleiki ?g gjøgnumskygni tryggjað í mun il tær avgerðir, sum verða tiknar í samráðnum.

Endamálið er, at dagføra lógarkarmarnar viðvíkjandi f?sturtøku í Før?yum, s? teir verða meira tíðarhóskandi, ?g at tryggja, at allar kvinnur eru eins fyri lógini. Galdandi lóg er ógreið ?g elvir til ótryggleika, óvissu ?g ójavna.
Endamálið við uppsk?tinum er s?muleiðis at hava f?sturtøkutalið s? lágt sum gjørligt. Dentur verður tí lagdur á at betra um møguleikarnar hjá kvinnum, sum umhugsa f?sturtøku, at fáa viðk?mandi ráðgeving frá fakfólki, eins ?g dentur verður lagdur á upplýsing ?g fyribyrging.

Uppsk?tið er sent til ummælis hjá viðk?mandi pørtum. Uppsk?tið liggur eisini á h?yringsp?rtalinum hjá landsstýrinum, har øll við áhuga kunnu viðmerkja.

Vinarliga

Gunnvá Ellendersen, leiðsluskrivari

Mobile: +298 558097
gunnvae@lmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

LØGMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Justice
Gongin 7, Postrúm 377, / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 306600 / lmr@lmr.fo / www.lmr.fo